

## Lehmann vil spæla við hjálmi

Seinasta vikuskiftið var kekkiski málverjin hjá enska meistarafelagnum, Petr Cech, so óheppin at bróta skallan. Tilburðurin hjá Cech hevur fingið týska málverjan hjá Arsenal, Jens Lehmann, at umhugsa at spæla við hjálmi.

– Eg umhugsi at spæla við hjálmi fyri at verja meg. Tað er ikki hóskandi at áleggja øllum málverjum at spæla við hjálmi, men um onkur ætlar sær tað, so skilji eg tað væl, sigur Jens Lehmann við Sunday Mirror.

Tað eru ongar reglur sum sýta fótbóltsspælarum at spæla við hjálmi, so leingi hjálmurin ikki er gjørdur við hørðum materiali.

## AaB varð eyðmýkt

Tað gekk av skriðuni hjá superligafelagnum AaB í gjár. Liðið spældi á heimavølli ímóti Randers FC, og tað endaði við stórsigri til Randers, sum vann á útivølli fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum. Randers legði seg á odda 2-0 í fyrra hálvleiki, og í seinna hálvleiki økti liðið tvær ferðir og vann sostatt 4-0. AaB hevur nú tapt heili 7-0 í seinastu tveimum dystunum á heimavølli. Eingin av føroysku spælarunum hjá AaB spældi við.

# Massa er tjóðarhetja, Alonso er heimsmeistari




*Felipe Massa og Jenson Button doypa nýkosna heimsmeistaranum Fernando Alonso í sjampanju*
*mynd: Scanpix.dk*

**Brasiliumaðurin Felipe Massa vann á heimabreytini, Alonso á øðrum plássi gjørdist heimsmeistari og Renault gjørdist heimsmeistari fyri lið. Hetta varð endin á eini hendingaríkari formil 1 koyring á Interlagos breytini í Brasilia**

FORMIL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tá brasilski flaggdómarin veittraði við ternutta flagginum fyri Felipe Massa, ið koyrdi fyrstur um málstrikuna á Interlagos breytini í Sao Paolo í Brasilia, fekk formil 1 ørasta tjóðin í heiminum, sín fyrsta brasilska sigur á heimabreytini í 13 ár.

Síðan sigurin hjá Ayrton Senna í einum McLaren Honda í 1993 hevur eingin brasiliumaður staðið ovast á skammlinum á Interlagos. Tí er Felipe Massa vorðin tjóðarhetja í Brasilia.

Felipe Massa koyrdi nærum feilfrítt og lá á odda alla koyringina. Eingin kundi røra hann. Ferrari hevði uttan iva besta bilin á degnum, og einasti møguligi avbjóðarin Michael Schumacher var sera óheppin hetta vikuskiftið.

Tað var Michael Schumacher, ið átti mest sannførandi avrikið á degnum. Hóast hann punkteraði og á 8. umfari lá aftastur á 20. plássi nærum eitt heilt umfar aftan fyri Ferrari liðfelagan Felipe Massa, endaði Schumacher á 4. plássi í síni allar síðstu formil 1 koyring.

Tað var ein svangur Michael Schumacher, ið vísti at hann uttan trupulleikar kundi havt kappast nøkur ár afturat. Hann byrjaði á 10. plássi, orsakað av tøkniligum trupulleikum í tíðarkoyringini. Men longu á 8. umfari fór hann framvið Renault bilinum hjá Giancarlo Fisichella á 5. plássi. Í nærum somu løtu punkteraði vinstra bakhjólið á Ferrari bilinum hjá Schumacher. Hetta hendi sera langt frá pittinum, og Schumacher noyddist at koyra spakuliga aftur til pittin. Hetta kostaði nógva tíð, men við sera sannførandi koyring yvirhálaði Schumacher ein bil fyri og annan eftir, men bitin var ov stórur at gloypa, og tað gjørdist bert til eitt 4. pláss.

Fernando Alonso var 10 stig framman fyri Schumacher í kappingini um HM, og við einum 2. plássi aftan fyri Massa, var heimsmeistaraheitið tryggjað. Hetta er annað ár á rað, at Alonso er heimsmeistari.

Jenson Button vísti, hví hann varð mettur at vera outsidari til HM áðrenn hetta kappingarárið. Av 14. plássi koyrdi Button sín Honda upp á eitt flott 3. pláss.

Takuma Sato hevur í alt ár bert kunna kappast við skiftandi liðfelagar sínar í Super Aguri, men í hesi koyringini fekk Sato eitt sera flott 10. pláss.

Fyri Williams liðið og Toyota liðið var dagurin ringur. Williams bilarnir hjá Rosberg og Webber rendu saman í einum av fyrstu svingunum, Webber kundi ikki halda fram, meðan Rosberg helt fram við fullari øði, men koyrdi inn í eitt sving við størri ferð enn skilagott var, og endaði í vegginum.

Toyota lá væl fyri inntil báðir noyddust at gevast við tøkniligum trupulleikum Trulli av 2. plássi.

**Úrslitið av koyringini á Interlagos**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Felipe Massa - Ferrari | 10 |
| 2 | Fernando Alonso - Renault | 8 |
| 3 | Jenson Button – Honda | 6 |
| 4 | Michael Schumacher – Ferrari | 5 |
| 5 | Kimi Räikkönen - McLaren-Mercedes | 4 |
| 6 | Giancarlo Fisichella – Renault | 3 |
| 7 | Rubens Barrichello – Honda | 2 |
| 8 | Pedro de la Rosa - McLaren-Mercedes | 1 |
| 9 | Robert Kubica - Sauber-BMW | |
| 10 | Takuma Sato - Super Aguri-Honda | |
| 11 | Scott Speed - STR-Cosworth | |
| 12 | Robert Doornbos - RBR-Ferrari | |
| 13 | Vitantonio Liuzzi - STR-Cosworth | |
| 14 | Christijan Albers - MF1-Toyota | |
| 15 | Tiago Monteiro - MF1-Toyota | |
| 16 | Sakon Yamamoto - Super Aguri-Honda | |

**Komu ikki á mál**

- Nick Heidfeld - Sauber-BMW
- David Coulthard - RBR-Ferrari
- Jarno Trulli - Toyota
- Ralf Schumacher - Toyota
- Mark Webber - Williams-Cosworth
- Nico Rosberg - Williams-Cosworth

**HM fyri koyrarar**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso, Spania | 134 |
| 2 | Michael Schumacher, Týskland | 121 |
| 3 | Felipe Massa, Brasilia | 80 |
| 4 | Giancarlo Fisichella, Italia | 72 |
| 5 | Kimi Räikkönen, Finnland | 65 |
| 6 | Jenson Button,Ongland | 60 |
| 7 | Rubens Barrichello, Brasilia | 30 |
| 8 | Juan Pablo Montoya, Kolumbia | 26 |
| 9 | Nick Heidfeld,Týskland | 23 |
| 10 | Ralf Schumacher, Týskland | 20 |
| 11 | Pedro de la Rosa, Spania | 19 |
| 13 | Jarno Trulli, Italia | 15 |
| 14 | David Coulthard, Skotland | 14 |
| 15 | Jaques Villeneuve, Kanada | 7 |
| - | Mark Webber, Avstralia | 7 |
| 16 | Robert Kubica, Póland | 6 |
| 17 | Nico Rosberg, Týskland | 4 |
| 18 | Christian Klien, Eysturríki | 2 |
| 19 | Vitantonio Liuzzi, Italia | 1 |

**HM fyri lið**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Renault | 206 |
| 2 | Ferrari | 201 |
| 3 | McLaren-Mercedes | 110 |
| 4 | Honda | 86 |
| 5 | Sauber BMW | 36 |
| 6 | Toyota | 35 |
| 7 | Red Bull Racing Ferrari | 16 |
| 8 | Williams-Cosworth | 11 |
| 9 | STR-Cosworth | 1 |